# Náttúruverndarlig nullhugsjón

JAN SØRENSEN
lívfrøðingur



Líkasum tað í seinastuni hevur verið tosað um eina nullhugsjón í ferðluviðurskiftum, so ber eisini til at tosa um eina nullhugsjón innan náttúru og náttúruvernd. Hetta at seta náttúruna í hásæti og undir ongum umstøðum at góðtaka oyðing ella at gera skaðilig inntriv í upprunanáttúru, og annars at arbeiða fyri at bøta um skaðan har hann longu er gjørdur.

**National Geografic heiður**
Fyri góðum mánað síðan setti heimskenda tíðarritið 'National Geografic' Føroyar ovast á listan yvir vitjunarverd oyggjasamfeløg fyri óspiltu og vøkru náttúru okkara. Hetta er ein varði innan føroyska ferðavinnu, og eigur at fáa okkum at hugsa, um hvat tað mundi vera, sum fekk hesi fólk at geva okkum henda heiður.

Ringt er at síggja, at vit hava uppiborið ein slíkan heiður, tí ikki er lætt at síggja, hvat vit hava gjørt fyri at varveita føroyska upprunanáttúru. Heldur kunnu vit siga, at tað enn ikki er eydnast at gera skaðan størri, enn hann longu er.

**Náttúruvernd í dag**
Einasta náttúruverndaramboðið, føroyska samfelagið hevur, er ein náttúrufriðingarlóg, sum bert virkar í stakmálum og ikki fevnir um nakra samanhangandi ætlan. Ætlanir hava verið frammi um at skifta friðingarlógina um við eina meira umfevnandi og nútíðarhóskandi Náttúruverndarlóg. Saman við eini lendisætlan eru glottar at hóma, men enn er langt á mál.

**Fram eftir fummum**
Í fjølmiðlunum eru dagliga umrøður av stórum byggiætlanum. Byggiætlanum, sum í ongum føri fyrst hava støði í, hvat føroyska náttúran klárar at bera óskemmað. Nevnast kunnu flogvallarætlanir, vatnbyrgingar, vindmyllur, havnagerðir, vegaføringar, alduverk, útstykkingar, bátahylar, grótbrot, heingibrýr, skemmandi bygningar o.m.a. Alt sett í verk, ella ætlandi sett í verk, uttan at fyrilit yvirhøvur er tikið fyri náttúru á nakran hátt. Umfram bygging hava vit eisini fjøruoyðilegging, koralloyðing, ov stórt seyðabit, ov høgt fiskiveiðitrýst, sandsúgving o.m.a.

Øll vilja framburð, men framburður goldin við oyðing av náttúru er kostnaðarmikil í mistum virðum, virðum, sum í nógvum førum ikki koma aftur og ofta ikki fáa eitt viðurkent virði, fyrr enn langa tíð aftaná. Ringt er at velja millum ítøkilig framburðaruppskot, og at halda hetta upp ímóti møguligum náttúruvirðinum Tí er best at meta um náttúruvirði frammanundan og síðan byggja framburð í tráð við tær ætlanir, sum frammanundan eru lagdar.

Náttúran er tað dýrabarasta vit hava, og eigur at verða virðismett sum so. Tað sømir seg als ikki einum framkomnum samfelag at bera seg at, sum vit gera. Tíverri eru tað nógvir føroyingar, ið als einki virði síggja í hesum. Hesi eru at finna bæði sum einstaklingar og sum meira skipaðar eindir í samfelagnum. Føroyska samfelagið eigur at vera so mikið at sær komið, at tað viðurkennir virðið í føroysku náttúruni og setir skipanir í verk at verja einar framhaldandi vakrar og natúrligar Føroyar.

Sosialurin og Rás2 seta fokus á náttúru- og umhvørvismál. Í blaðnum seinastu dagarnar hava vit umrøtt ymisk viðurskifti á økinum. Í kvøld klokkan 1930 verða náttúru- og umhvørvismál evni á politiskum Trapputingi í Miðlahúsinum. Trapputingið, ið verður skipað í samstarvi við Lívfrøðingafelagið, verður sent beinleiðis á Rás2.

# At ræða við tølum

KIRSTIN STRØM BECH
Borgarstjóri, Vágur



**Viðmerking/rætting til lesarabrævið "Hevur tú hugsað teg um?" hjá Sirið Stenberg.**

Í hesum lesarabrævi/grein dagfest 28-12-2007 verður sagt

…… eitt røktarheim kommunurnar sjálvar skulu gjalda, soleiðis at borgararnir í kommununum skulu gjalda rokningina upp á uml. 70 mill kr……..

Her verður hugsað um ætlaða ellis/røktarheimið byggjast skal í Vági.

Freistandi er at nýta tøl til villleiðing - serliga upp til eitt val.

Um valevnið, ið skrivað hevur, ætlar at ræða fólk, ella bert er óvitandi um, hvussu tingini hanga saman, er ilt at siga. Fyri at fáa røttu tølini á borðið, skal her verða upplýst, at Løgtingið í dec. 2006 játtaði kommununum eitt lán á 26,5 mill kr. Harafturat hevur Almann- og heilsumálaráðið játtað 12 mill kr. sum stuðul.

Av hesum 26,5 mill kr. er parturin hjá Vágs kommunu umleið 16,5 mill kr.

Heim fyri sinnisveik er ein landsuppgáva burturav, sostatt rindar landið bæði íløgu og rakstur.

Kommunurnar bera ikki kostnaðin av tí, sum gjørt er í samband við Miðnámsskúlan.

# Gravkúgvin í Older-Dahlinum

lag: Í Himmalheiminum…

Í Older-Dahlinum stendur aftur nú ein kúgv -
aftur nú ein kúgv - ja, aftur nú ein kúgv,
Í Older-Dahlinum stendur aftur nú ein kúgv,
men eingin sigst vita hví.
Val er, val er, kanska er tað tí,
kúgv er komin Older-Dahlin í,
hetta er helst stemmufiskarí,
ei nakar ivast man í tí.

Skal hendan góða kúgv geva vágbingum ta trúgv,
vágbingum ta trúgv, ja, vágbingum ta trúgv,
at nakar setir búgv - bara tí ein gomul kúgv
í Older-Dahlin komin er.
Val er, val er, passa tí uppá,
lat teg ikki draga upp á tráð,
hetta her kann lumpa nøkur fá,
sum svølgja øllum lyftum ráð.

Tá valið tað er av, verður kúgvin sikkurt flutt,
hon var ein narrisutt, ja, bert ein narrisutt,
og øll, sum trúðu hesum, tey sita tá so mutt,
og støðan kennist heilt akutt.
Val er, val er, verið upp á vakt,
trúgvið ikki nøkrum, sum varð sagt,
tí alt snýr seg bert um vald og makt,
so betri var, teir høvdu tagt.

Nei, lat teg ikki lumpa av hesi góðu kúgv,
sum stendur har so trúgv, hon reisir einki búgv,
men hevja heldur hugin og hægri tú tær flúgv,
og bert upp á teg sjálvan trúgv.
Val er, val er, nakað eftir jól,
kúgvin hon er bert eitt skálkaskjól,
tann, sum nú skal lumpa Per og Pól,
er hann sum miðnámsskúlan stjól.

**NePtuN (2007)**

# Kræftpatienter lades i stikken

SOFUS HANSEN

**Til Sundhedsminister Hans Pauli Strøm Og ledelsen på syghusene i Torshavn, Klakksvig og Tvøroyri.**

Den 18. dec 2007 havde jeg et læserbrev om systematisk lægesjusk, jeg havde ikke forventet nogen reaktion fra ovennævnte, og det fik jeg heller ikke.

I læserbrevet den 18. Dec, skrev jeg, at jeg er kommet i den tvivlsomme situation, at jeg er kommet i besiddelse af dokumenter, der er så belastende for det færøske sygehusvæsen, at de for alt i verden ikke må komme ud til offentlig beskuelse.

Derfor ønskede jeg at gå i offensiven, mod landslægen Høgni Debes Joensen, socialministeren Hans Pauli Strøm, overlæge Jan Jespersen, ledelsen på sygehuset i Torshavn, Tværø og i Klaksvig, samt forhenværende Socialminister Bill Justusinesen.

Det der gør, at jeg nu offentliggør dette dokument, grunder jeg på alle de gruopvækkende historier i Færøernes største avis Dimmalætting, samt det Sosialen fremkommer med yderligere en grusom historie om Sverra Nilssen, Sverri Nilssen der mistede en hånd / arm af færøske lægers sjusk på grund af sløseri fra ledelsen på sygehuset.

**Dokument I**
Brev indgået den 24. okt 2005 i sag om lægefejl. Her skiver Overlæge Jan Jespersen Sygehuset Tvøroyri.

- Overlæge Jens Bagger foudser i sin vurdering ideelle forhold, d.v.s. Et større sygehus med patologisk afdeling og patalog, samt velfungerende ambulatorium med ortopædkirurgi.

- Vi havde tidligere på Landssygehuset i Torshavn en velfungerende patologisk afd. med patalog. Der er fortsat en vis patologisk afdeling, men ingen patolog. Men der er en velfungerende aftale med Rigshospitalet.

- Imellem disse to tilstande har der været en periode, hvor vi kun havde en deltidsanst, pensioneret patalog. I den periode skulle man helst ikke indsende for mange præparater, da kapaciteten var begrænset. Jeg går ud fra, at dt er derfor der ikke er indsendt præparater ved 2. og 3. excision af tumoren i denne sag.

**Stop galskaben**
Hvor mange færinger sidder i dag med et stort spørgsmålstegn. Er det kræft eller er det anden sygdom, hvad med at få svar på spørgsmålene, alle jer der er i minste tvivl om sygdommen eller har mistanke om kræft, for guds skyld rejs vek, tænk på jeres børn, Danmark er heller ikke nr 1, men dog her er der en behandlings - mulighed.

Er det næste, og måske seneste udvej at stoppe galskaben og de gruopvækkende historier på de færøeske sygehusene, Kriminalpolitiet eller Bagmandspolitiet?

Hvor mange skal DØ på grund fejlbehandling, hvor meget skal de der har overlevet blive udsat for, hvad med dem der sidder med stor sorg på grund af en ledelse på sygehusene, er meningen at sundhedsministeren og ledelsen bare skal vaske hænderne rene, er tiden ikke kommet at rense ud i de tre, ja måske 4 eller 5 øverste etager.

Er det sådan, at jeg som fastboende færing i Danmark bliver nødt at anmelde Sundhedsministeren og hele ledelsen på sygehusene i Torshavn, Tvøroyri og Klaksvig til Kriminalpolitiet eller Bagmandspolitiet? Jeg er sikker på, at skete dette i et demokratiskt land, blev sundhedeministeren, ledelsen på sygehusene bortvist. og en uvildig undersøgelse sat i gang.